
Skandi Africa er ársins skip í norsku sjóvinnuni. Mynd: Vard

# Hetta er ársins skip

**Jógvan Hugo Gardar**

02.06.2015 - 14:15

Oljan.fo

Á Nor-Shipping-stevnuni í Lillestrøm i Noregi, er í dag "The ship of the year" útevnt. Fimm skip sum vóru latin eigarunum í 2014 og higartil i 2015 vóru við í kappingini.

Vinnari gjørdist Skandi Africa hjá reiðarínum DOF. Skipið er bygt á skipasmiðjuni Vard Søviknes.

Skandi Africa er 160,9 metrar langt og 32 metrar í breiddini.

Skipið er sergjørt til at arbeiða í oljuvinnuni, og hevur eina fimm-ára-avtalu við Technip.

Bæði umboð fyri reiðarí og skipasmiðju vóru hjástødd, tá norski vinnumálaráðharrin, Monica Mæland, avdúkaði vinnaran.

